Spurningar Landsnet

1. Útboð at dátusamskifti til Landsnet.pdf
   Síða 2: Í undir teiginum "Útboðstilfarið" er kravfestinging ið er viðheft á keypsportalinum ikki nevnd. Er hetta ein feilur, ella er kravfestingin ikki ein partur av útboðstilfarinum ?

   *Svar: Hetta er ein feilur – skjalið Kravfesting av dátusamskifti til Landsnet.pdf er partur av útboðstilfarinum. Haldið okkum til góðar*

2. Útboð at dátusamskifti til Landsnet.pdf síða 3, meting av tilboðum, viðv. 2. Landsnet metir at Samnet er besta loysnin, men vil góðtaka eina breiðbandsloysn. Hvat er lutfallið millum loysnirnar, Samnet og site to site VPN breiðbandsloysn, tá umræður hvussu stig vera givin.

   *Svar: Sí punkt 7.*

3. Útboð at dátusamskifti til Landsnet.pdf síða 4, fyrivarni/alternativ tilboð, í hesum reglubroti leggur Landsnet vekt á at tilboð við fyrivarni greitt kunnu samanberast við breiðband. Verður tá meint við tað sama sum ein site to site VPN breiðbandsloysn?

   *Svar: KT Landsins biður um tilboð uppá Samnet og breiðband og tí ynskir KTL, at eitt møguligt alternativt tilboð skal kunna samanberast til Samnet og breiðband – annars verður tað ógjørligt at meta um.*

4. Útboð at dátusamskifti til Landsnet.pdf síða 4,
   Her stendur aftur at tilboð skulu lúka krøvini sum standa í útboðstilfarinum, her vilja vit aftur vísa til fyrsta spurning, um at kravfestingin ikki er partur av útboðstilfarinum.

   *Svar: Hetta er ein feilur – skjalið Kravfesting av dátusamskifti til Landsnet.pdf er partur av útboðstilfarinum. Haldið okkum til góðar.*

5. Útboð at dátusamskifti til Landsnet.pdf síða 4, reglubrot 6*, ( KTL er ikki bundið at taka av omanfyristandandi tilboði frá tilboðsgevaranum*), kunnu tit greiða nærri frá hvussu hetta skal skiljast ? Merkir tað, at um ein veitari "vinnur" útbjóðingina við besta prísi, bestu tøkniligu loysn og bestu sjálvgreiðslu – so er KTL ikki bundið at taka av tilboðinum frá hesum veitara ?
   Er hetta í tráð við útboðspolitikkin hjá landinum ?
   Eru aðrir faktorar ið ikki eru nevndir í útboðstilfarinum ið kunnu vera avgerðandi fyri hvør vinnur tilboðið? Um ja, hvørjir eru hesir og verða teir nevndir í endaliga útboðstilfarinum ?

Hvør er orsøkin til at KTL velur at bjóða út, um veitarar við besta samlaða tilboðnum møguliga ikki vinna útbjóðingina ?

*Svar: Endamálið við at bjóða út er, sum tað stendur í Rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum; at fáa meira úr peningi skattgjaldarans við at skipa landsins keyp av vørum og tænastum. Vit velja eisini at bjóða út fyri at geva øðrum veitarum ein møguleika at veita okkum hesa tænastu. KTL hevur eisini siðvenju at bjóða tænastur og keyp av vørum út. Um tilboðið ikki er bíligari og betri enn loysnin, ið KTL hevur frammanundan, tekur KTL sær rættin til ikki at taka av tilboðnum.*
*Verða onnur viðurskifti tikin við, enn tey, sum eru nevnd í samlaða útboðstilfarinum, so verður útboðtilfarið broytt samsvarandi.*

6. Kravfesting av dátusamskifti til Landsnet.pdf síða 2, 1.1 yvirskipað, reglubrot 6, Landsnet nevnir her bæði vinnulig og privatbreiðbond. Kunnu tit siga hvussu nógv eru av hvørjum slag av breiðbandi?

   *Svar: Nú er tað bert høvðus intersambandið, sum er vinnuligt breiðband. Í Fylgiskjal B – Breiðband síggjast øll breiðbondini - gott 50 í talið. Sum nevnt so kann ein lækking í kostnaðinum fyri Samnet føra við sær, at breiðbondini verða umskipað til Samnet.*

7. Kravfesting av dátusamskifti til Landsnet.pdf síða 2, 1.1 yvirskipað, reglubrot 8, Landsnet nevnir møguleikan at veita site to site VPN breiðband í staðin fyri Samnet. Samnet er í dag raðfest fram um aðra ferðslu hjá FT-NET. Vit hava fingið upplýst frá FT-Net at tað er í dag ikki møguligt at fáa raðfesting av ferðsluni á breiðbandinum. Kann ein site to site VPN breiðbandsloysn uttan raðfesting av "data" ferðsluni, samanberast við Samnet og um ikki, kann Landsnet so dagføra útboðið samsvarandi? Um ja, hvussu nógv telur tað niður í stigageving at sambandið ikki er "raðfest í kjarnunetinum hjá FT Net" ?

   *Svar: Raðfesting av ferðsluni meta vit sum ein týðandi part av veitingini og letur tað seg ikki gera at raðfesta ferðsluna á breiðbandinum so meta vit ikki, at veitingin kann samanberast við Samnet og lýkur veitingin tí heldur ikki minstu krøvini.*

8. Kravfesting av dátusamskifti til Landsnet.pdf síða 3, 1.1 yvirskipað, reglubrot 1, vísandi til fylgiskjal c, verður víst, hvat veitarin skal veita innanfyri tær stripladu linjurnar á myndini. Er tað so, at routarin innanfyri stripladu linjurnar á myndini, stendur á stovninum?

   *Svar: Ja, hann er úti á lokatiónini og er eisini gateway fyri lokatiónina. Hin routarin á lokatiónini vísur, at tað ofta eru fleiri vlan úti á lokatiónin og ein L3 switch stendur fyri vlan routingini á staðnum.*

9. Kravfesting av dátusamskifti til Landsnet.pdf Síða 3, 2.1 – Longd av sáttmála.

   Er talan um ein 3 ára sáttmála, ella um ein 1 ára sáttmála ?

Tá krav frá KTL er um at prísirnir á sambandunum skulu fylgja prísgongdini hjá FTNet, hvør er so orsøkin til at KTL ikki ynskir at binda seg í 3 ár ?
Hvat skal til frá veitarans síðu fyru at sáttmálin verður longdur, ella umvent, hvat skal til fyri at sáttmálin ikki verður longdur ?
Harnæst er at siga at í samband við at skift verður frá einum veitara til ein annan, eru nógvir umskiftiskostnaðir til FT-Net tengdir at kostprísinum hjá nýggjum veitarum. Tí vil eitt úboð við einum 1 ára sáttmáli vera ein greiður fyrimunur til verandi veitara, tí hesin ikki hevur nakrar umskiftiskostnaðir. Hetta meta vit skeiklar kappingina og fer uttan iva at gera endaligu tilboðini dýrari.

*Svar: Vit ynskja ein trý ára all in clusive sáttmála har allir kostnaðir eru við, men í ekstra ordinerum umstøðum ynskja vit hava møguleika at sleppa burturúr sáttmálanum. KTL roknar eisini bert í heilt lítlan mun at skula brúka innanhýsis resurssir í samband við eitt skifti.*
*Í fall, at sáttmálin verður uppsagdur áðrenn tíð vil KTL halda tilboðsgevaran skaðaleysan. Tilboðsgevarin skal eftir openbookskipanini vísa hvørjar beinleiðis útreiðslur veitarin hevur havt av avtaluni, um sáttmáli verður uppsagdur í úrtíð. Vísur tað seg hinvegin, at veitingin í veruleikanum ikki livur upp til krøvini, ella vegna, men ikki avmarkað til, langar svartíðir, pakkatap o.a., sum gera sambandið ónýtiligt er talan um mishald og kann sáttmálin uppsigast, men hetta er sjálvandi ein onnur støða.*
*Dømi um ekstra ordinerar umstøður kunnu vera, men ikki avmarkað til, at nógvir stovnar fara úr Landsneti ella, at Landsnet verður niðurlagt.*

*10.* Kravfesting av dátusamskifti til Landsnet.pdf síða 4, 3.1 skiftistíð, reglubrot 1, hvør eigur verandi útgerð? Hvør hevur rætt og møguleika til at gera tillagingar av verandi útgerð?
Tað er umráðandi fyri okkum sum tilboðsgevara at hava eina greiða mynd yvir hvussu nógv nýggj útgerð krevst og hvussu nógvari útgerð broytingar skulu gerast í. Eisini er umráðandi at fáa staðfest hvør skal gera broytingarnar í verandi útgerð – er tað ein eksternur veitari ið ger broytingarnar og tilboðsgevar ið ber kostnaðin av hesum, ella er tað tilboðsgevari ið fær atgongd at gera neyðugu broytingarnar?
Aftur her vísa vit til fyrra spurningin, um sáttmála longdina. Tað eru sera nógvir eingangskostnaðir tengdir av einum skifti í hesari støddini, tískil hevur verandi veitari ein greiðan fyrimun um sáttmálin bert er 1 ár og prísurin á tilboðnum verða uttan iva hægri enn um úboðið fevndi um ein 3 ára sáttmála.

*Svar: KTL eigur útgerðina og Formula rekur útgerðina. Um tilboðsgevarin yvirtekur verandi útgerð so er tað tilboðsgevarin, sum ger broytingarnar, tó skal Formula møguliga gera broytingar soleiðis, at tilboðsgevarin fær atgongd til útgerðina so útgerðin kann umforritast til netið hjá tilboðsgevara. Talan er um er ein all inclusive avtalu so tað er tilboðsgevarin, sum ber allan skiftiskostnaðin. KTL roknar eisini bert í heilt lítlan mun at skula brúka innanhýsis resurssir í samband við eitt skifti.*